## Stóribeiggi er gløggast

Ein norsk kanning vísur, at elsti beiggin í familjuni er tann gløggasti. 250.000 menn føddur í árunum 1967 til 1976 hava tikið lut í kanningini. Í mátingarlistanum hjá kanningini fingu elstu beiggjarnir í miðal 57%, meðan teirra yngri brøður fingu í miðal 43%. - Hóast munurin ikki er serliga stórur, kann hetta fáa ávirkan á útbúgvingarnar hjá teimum, sigur Petter Kristensen, sum vegna Statens arbeidsmiljøinstitutt í Noregi er leiðari av kanningini.



## Dannebrog flaggað fyri seg

Mánadagin í síðstu viku varð flaggað fyri seinastu ferð í bispagarðinum í Havn. Flaggað varð fyri hansara kongaligu hátign Hendriki prinsi henda dagin, av tí at hann hevði føðingardag henda góðveðursdagin. Av tí at fólkakirkjan nú er yvirtikin, verður framyvir flaggað við Merkinum. Hetta verður tó ikki fyrstu ferð at Merkið verður vundið á stong niðri í bispagarðinum, tí siðvenjan hevur verið, at flaggað við Merkinum hátíðardagar. Dannebrog verður nú tikið í varðveitslu í bispagarðinum.

# Seljarin avger tillutingina

**Tað er Fíggingargrunnurin, ið sum seljari hevur staðið fyri tillutingini av partabrøvunum, og hvussu býtið hjá ymsu íleggjarunum skuldi verða**

PARTABRØV
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka, sigur, at tað er Fíggingargrunnurin frá 1992, ið sum seljari hevur gjørt av, hvussu tillutingin av partabrøvum er farin fram*

– Sum insidarar er leiðsla bankans umfatað av strongum reglum, og avmarkað í sínum møguleikum at handla partabrøv bankans til tíðarskeið, har øll viðkomandi vitan um bankans virksemi er atkomulig fyri allar íleggjarar. Tekningartíðarskeiðið er júst eitt høvi at keypa partabrøv, tí prospektið lýsir allar tættir av virksemi bankans.

Tað sigur Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka, tá Sosialurin fregnast eftir, hvussu tað ber til, at stjórarnir báðir hava fingiði tillutað so nógv partabrøv.

Fyri at fyrbyrgja, at starvsfólk koma at aðrari vitan enn aðrir íleggjarar, hava starvsfólkini í bankanum í veruleikanum fingið harðari treytir enn vanligi íleggjarin.

– Fyri øll starvsfólk bankans var galdandi, at tey skuldu geva síni boð inn fyrsta tekningardagin, júst fyri at sleppa undan, at vit kundu fylgja við gongdini og síðani bjóða hareftir, sigur Janus Petersen.

Hann vísir á, at tað stendur í prospektinum, at eingin íleggjari fær nakrar sersømdir, og tað er eisini galdandi fyri starvsfólk eins væl og leiðslu bankans. Tó við tí undantaki, at starvsfólkini kundu fáa tryggjað upp í 500 partabrøv.

Og tað var somuleiðis galdandi fyri starvsfólk eins væl og leiðslu.

Síðani var tað sjálvsagt upp til hvørt einstakt starvsfólk sær, hvussu nógv tey bjóðaðu, men tað, sum fór upp um tey nevndu 500 partabrøvini, varð latið eftir sama leisti, sum øll onnur eisini fingu.

– Vit hava virkað sum søluumboð fyri Handelsbanken tá tað snýr seg um smærru íleggjararnar. Og tað hava vit gjørt á sama føti, sum Eik Banki og Sparikassarnir. Men tá tað kemur til størru íleggjararnar, hava vit bert virkað sum millumlið, tí hesir skulu allir venda sær til Handelsbanken, sigur Janus Petersen.

### Grunnurin suverenur

Forstjórin vísir á, at tað júst er ein av treytunum fyri at verða børsskrásettur, at opinleikin krevur, at allir upplýsingar eru atkomiligir hjá almenninginum. Eisini hvussu nógv stjórarnir í einari fyritøku eiga av partabrøvum í somu fyritøku.

– Hetta er sjálvandi nakað, sum hevur áhuga millum fólk, tí tað skapar eitt ávíst álit, at leiðslan í einari fyritøku sjálv eigur partabrøv í henni. Ella sagt øvugt, so hevði tað helst virkað eitt sindur undarligt, um leiðslan eingi partabrøv átti í fyritøkuni, tí tað hevði væl verið greitt tekin um, at leiðslan ikki hevði álit á fyritøkuni og sær sjálvari, sigur Janus Petersen.

Við partabrøvum fyri eitt virði av ávikavist seks og fýra og einari hálvari milliónum koma Janus Petersen og Súni Schwartz Jacobsen upp í bólkin av størru íleggjarunum, og í prospektinum stendur, at Fíggingargrunnurin metir um og tillutar partabrøv til hesar eftir hvørjum einstøkum íleggjara sær.

Janus Petersen undirstrikar tó, at tað er Fíggingargrunnurin frá 1992 og eina hann, ið ger av, eisini hvussu hann útlutar partabrøvini til stjórarnar í bankanum. Forstjórin hevur bjóðað á sama føti sum onnur, men vil tó ikki siga, hvussu nógv hann hevur bjóðað.

– Tað er ein persónlig søk, sigur Janus Petersen.

Hann vísir annars til prospektið sum sigur, at Handelsbanken hevur koordinerað søluna, ført tekningarbókina og virka sum ráðgevi hjá Fíggingargrunninum frá 1992 í sambandi við tilutanina.